TING-HELLAN

# rk, nær fara fyrivarnini?



vinarligu flokkarnir í Danmark hava. Henda atkvøðugreislan skal tryggja, at Danmark kemur eitt fet nærri og við í tað samstarvið, sum ES grundlógin leggur upp til. Verður meiriluti fyri grundlógini, verða fyrivarnini, ella í hvussu so er partar av teimum send til fólkaatkvøðu, so skjótt sum ES vinarligu flokkarnir halda tað bera til. Stjórnin sigur jú púra greitt, at fyrivarnini stríða ímóti donskum áhugamálum, og at tey helst skulu burtur.

### Fólkatingsvalið og ES

Í føroyska valstríðnum til júst lokna fólkatingsvalið, vóru á breddanum so at siga bert mál út eftir, har ímillum framtíðarstøða Føroya mótvegis ES, og hvat vit skulu gera, verða tey fýra fyrivarnini tikin av.

Sjálv ES grundlógin broytir, sum sagt ikki so nógv beinleiðis fyri Føroyar, tað er jú staðfest at hon ikki skal hava virkni fyri Føroyar. Men óbeinleiðis fer hon at hava ávirkan, bæði tí at fleiri málsøkir sum samstarvað verður um í ES koma undir meirilutaavgerð við ongum sýtingarrætti fyri limalondini. Tvs. at donsk málsøkir verða í størri mun tengd at ES avgerðum. Hetta fer eisini at ávirka danskan uttanríkispolitikk, tí heildin í donskum uttanríkispolitikki í tí takstiska spælinum, nú gerst tættari knýtt at ES. Okkara uttanríkispolitikkur fer jú umvegis Danmark.

### Fraklendingar avgerandi

Nú er starturin skotin í tilgongdini um eitt tættari Evropa, og tíðin komin til at eisini vit í Føroyum mugu taka eina støðu. Her finst einki status quo. Okkara støða broytist í hvussu so er munandi, um Danmark avgerð at taka fyrivarnini av. Okkara støða er eisini tengd at hvat Ísland og Noreg velja at gera. Og ES tilgongdin er ikki bert tengd at Danmark, men at londunum, har ES grundlógin er løgd út til fólkaatkvøðu um at taka undir við henni. Fólkaatkvøða hevur verið í Spania og var meiriluti fyri grundlógini. Men tað er serliga Frakland, sum er umráðandi fyri ES. Mett verður, at um fraklendingar siga nei, verður ein ES grundlóg ikki sett í verk við bræði.

### Føroysk støðutakan

Spurningurin er tó um tað er nóg gott at vit í Føroyum bíða eftir hvat ES limalondini avgerða. Um tíðin ikki er búgvin til at vit aktivt fara inn í eina tilgongd, har vit avgerða hvussu vit ynskja okkara viðurskifti eftir teim trimum scenariunum, við at 1) Danmark ikki tekur undir við ES grundlógini, 2) at Danmark tekur undir við henni og 3) at fyrivarnini verða tikin av.

Politiska skipanin eigur at fyrireika seg uppá hesar møguligu stóru broytingarnar, men eisini er tað eitt ófrávíkiligt krav til flokkarnar, at teir samstarva um loysnir. Her er ikki nóg mikið, at flokkarnir koma við hvør sínari loysn, sum flokkarnir síðan fara at klandrast um. Her krevst ein tjóðskaparlig semja, og her krevst felags stev fyri at hava styrki í teimum neyðugu samráðingunum úteftir. Her krevst at flokkarnir semjast um pallin, vit skulu virka eftir og umvegis í framtíðini.

## Donsku ES fyrivarnini

Føroyar er ikki limur er ES, tað er Danmark. Danmark er tó limur við undantøkum, soleiðis at verja, gjaldoyra, ríkisborgararættur og rættarlig og innanlendisviðurskifti á yvirstatsligum støði ikki er umfatað.

ES er í dag skipað í trimum sonevndum súlum, har súla 1 er yvirstatslig samstarv, meðan samstarvið undir súlu 2 og 3 er millumtjóða. Munurin er, at ES avgerðir undir súlu 1 eru bindandi fyri limirnar, meðan tjóðartingini í einstøku limalondunum hava seinasti orðið viðvíkjandi avgerðum undir súlu 2 og 3, sum í øðrum millumtjóða samstarvi.
Leisturin í traktatuppskotinum um eina ES grundlóg, er at fara burtur frá súlubygnaðinum, soleiðis at ES fær evsta myndugleikan á nærum øllum samstarvsøkjum. M.a. skal mannarættindachartari mennast frá at verða politisk mál, til at verða lógarfest mál, har ES kann fara eftir limalondunum, sum ikki uppfylla krøvini.